Ingilín Didriksen Strøm
løgtingsmaður

Nr. 24/2019

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um sálarligan harðskap, settur landsstýrismanninum í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Er ætlanin at seta lóg í verk, sum javnsetur kropsligan- og sálarligan harðskap?
2. Verður farið undir at seta á stovn eina móttøku til tey, ið eru fyri harðskapi, har øll neyðug hjálp og ráðgeving er savnað?

Viðmerkingar:
Sameindu Tjóðir hevur ásett 25. november at vera altjóða dagur fyri at basa harðskapi móti kvinnum. Á fundi, ið Amnesty International Føroyar, Kvinnuhúsið, Sig Frá og Almannamálaráðið skipaðu fyri, fríggjadagin 21. november, varð greitt, at týdningurin at basa harðskapi framvegis er alstórur.

Greitt varð frá, at umstøðurnar hjá teimum, ið eru fyri harðskapi, ikki eru nøktandi í dag. Hetta er serliga av teirri orsøk, at einki savnað tilboð er til hjálp og ráðgeving, men at tann harðskapsrakta skal til ymiskar stovnar í býnum at boða frá, fáa ráðgeving o.s.fr. Hetta er ein ógvuliga óheppin og fløkt mannagongd, ið endurspeglar fløktu sinnisstøðuna hjá tí harðskapsrakta. Tað kann í síðsta enda gera støðuna enn verri.
Ragna Bjorg Guðbrandsdóttir, ið starvast á Bjarkarhlíð, greiddi frá tilboðnum í Íslandi. Staðið er ein móttøka, ið veitir alla neyðuga hjálp, stuðul og vegleiðing á einum stað. Eina slíka móttøku kundu vit umhugsað at sett á stovn í Føroyum.
Harumframt varð borið fram, at sálarligur harðskapur framvegis ikki er javnsettur við likamligan harðskap í Føroyum.
Sambært tølum frá Kvinnuhúsinum eru 370 fráboðanir í 2018 um sálarligan harðskap. Danski stovnurin Lev Uden Vold savnaði í 2018 altjóða gransking um avleiðingarnar av sálarligum harðskapi. Við útgangsstøði í 38 granskingarverkætlanum sæst greiður samanhangur millum sálarligan harðskap og ávikavist angist, PTSD og tunglyndi. Trýstið, ið sálarligur harðskapur hevur við sær, ávirkar harumframt evnini at vera foreldur og likamligu heilsuna neiliga.
Sambært §245 stk. 2 í revsilógini kann tann, sum ger skaða á annans likam ella heilsu, verða revsaður við fongsli í upp til 6 ár. Skaði á heilsu fevnir eisini um sálarligar løstir.
§266 í revsilógini fevnir um tann, sum hóttir við at fremja revsiverda gerð, og hóttanarmátin er egnaður til at kunna skapa stóran ótta fyri lívi, heilsu ella vælferð hjá tí hótta ella øðrum. Revsiramman er sekt ella fongsul í upp til 2 ár.
Sálarligur harðskapur er sostatt ikki kriminaliseraður sjálvstøðugt, men bert í samband við annan harðskap, tvingsil og hóttanir. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 27. november 2019

Ingilín Didriksen Strøm